# Stríddust fyri sakini



**LIVA ENN**

*Gudmund Nielsen roynir her at sleppa millum tveir av spælarunum hjá Kalmar FF í dystinum í gjárkvøldið, har EB/Streymur tapti tepurt og tí framvegis megnaði at halda lív í europeisku vónini*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**EVROPA LEAGUE** Hóast eitt seint mál gjørdi, at EB/Streymur tapti fyrra dystin ímóti svenska Kalmar FF, livir europeiska vónin enn. Talan var um ein stríðsinnsats, ið mundi givið javnleik

Hilmar Jan Hansen

EB/Streymur legði bragdliga fyri í dystinum á Fredriksskans IP í Kalmar, og longu í øðrum minutti hevði Gudmund Nielsen fyrstu royndina á málið. Yvirhøvur tordu sundalagsmenn, sum í gjárkvøldið spældu í hvítum búna, væl at bjóða Kalmar FF av, og tað gekk tí ikki væl hjá svenskarunum at fáa spælið at hanga stórvegis saman.

Sjálvt um teir í EB/Streymi løgdu stóran dent á at vera tættir í verjupartinum, bæði í verjuni og á miðvøllinum, spældu teir væl saman frameftir, og burtur úr tí spurdust fleiri hálvir kjansir. Fyrstu trý korterini høvdu spælararnir eisini bæði orku og yvirskot til at loysa uppgávuna.

Kalmar FF hevði frammi í síni vinstru síðu ein sera kvikan spælara, men hann kom slett ikki til sín rætt, tí Bjarni Jørgensen ansaði honum so væl. Í staðin royndu svenskararnir at senda høgar og langar bóltar fram til hinar báðar í álopinum, men tað gav púrt einki.

Ein broyting á liðnum hjá EB/Streymi var, at Sorin Anghel aftur var við, og tað gjørdi veruliga góðan mun. Hann spældi sum eitt slag av »miðju-sweepara«, stríddist væl fyri sakini og vann nógv í luftini. Ei undur í, at hann hevur verið saknaður síðstu dystirnar, nú hann hevur verið heima í Rumenia í útbúgvingarørindum.

Eisini var Daniel Udsen fluttur inn á miðvøllin at spæla, og tað bøtti eisini munandi um samanhangin í spælinum hjá EB/Streymi, ið var væl við í fyrra hálvleiki. Hóast spælararnir sóu ljóst upp á tað í hálvleikssteðginum, so skuldi tað vísa seg, at seinni hálvleikur myndaði seg nakað væl øðrvísi enn fyrri.

### Brasilsk bjarging

Nokk so skjótt setti Kalmar FF seg á tað nógva av spælinum, og tí gjørdist talan um eitt ávíst trýst, ið tó ikki gav teir stóru kjansirnar. Onkra ferðina mátti René Tórgarð vísa sínar snildir, og aðrar ferðir var verjan fyri, tá tað var um at gerast vandamikið.

Størsta málmøguleikan av øllum fekk Arnbjørn Hansen. Bólturin kom frameftir við kós ímóti Gudmundi Nielsen, ið var rangstaddur, men tá hann gekk aftureftir og læt bóltin fara, fór Arnbjørn stormandi einsamallur ímóti málinum. Temjingin var bara ikki nóg góð, so bólturin fór í so langt frá honum, og tí eydnaðist málverjanum hjá Kalmar FF at verða fyrri á bóltinum.

Tá góðir 10 minuttir vóru eftir, gjørdi Kalmar FF eina dupulta útskifting, og hon skuldi vísa seg at muna. Ikki gekk nógv meira enn ein minuttur, so vóru teir báðir innskiftu brasilianararnir upphavsmenn til kvika gjøgnumspælið mitt fyri, ið endaði við, at ein triði brasiliari, Ricardo Santos, gjørdist púra leysur mitt fyri og skoraði trygt.

Hóast EB/Streymur brúkti nógva orku og eisini møddist, sum tað leið út á seinna hálvleik, er talan um eitt gott útivallarúrslit undan seinna dystinum, sum verður á Svangaskarði næsta hóskvøld. Megnar EB/Streymur at halda svenska liðnum líka væl, samstundis sum egnir kjansir verða brúktir rætt, er møguleikin brádliga har.

hilmarjan@sosialurin.fo

**UEFA Europa League** · Fredriksskans IP í Kalmar, 1. juli 2010 kl. 20.00

## Kalmar FF - EB/Streymur 1-0 (0-0)

**1-0: Ricardo Santos, 79.**
Dómari: Stefano Poedschi (San Marino)

**Kalmar FF:** Petter Wastå – Mattias Johansson, Marcus Lindberg, Tobias Carlsson (Stefan Aalander, 53.), Stefan Larsson – Tobias Eriksson (Daniel Mendes, 77.), Henrik Rydström, Erik Israelsson (Marcel Sacramento, 78.) – Daniel Sobralense, Ricardo Santos, Abiola Dauda
**EB/Streymur:** René Tórgarð – Gert Hansen, Marni Djurhuus, Egil á Bø, Dánjal Davidsen – Sorin Anghel – Gudmund Nielsen, Pætur Dam Jacobsen, Daniel Udsen, Bjarni Jørgensen (Arnar Dam, 65.) – Arnbjørn Hansen
***Gult kort:*** Daniel Udsen

# Heðin errin

– Eg haldi, at vit hava eitt fínt útgangsstøði undan seinna dystinum. Við góðari uppbakking kunnu vit gera tað uppaftur betur í seinna dystinum á Svangaskarði, sigur Heðin Askham, venjari hjá EB/Streymi, ið viðurkendi, at stórur munur var á fyrra og seinna hálvleiki.

– Í fyrra hálvleiki tora vit at spæla og fáa eisini fleiri hálvar kjansir, men eftir steðgin vóru vit undir nógv størri trýsti, so orkan fór at ganga undan. Men vit vóru alla tíðina væl skipaðir, og eg eri sera errin av tí innsatsi, mínir spælarar vístu.

Tað kundi Heðin eisini vera, tí venjarin hjá Kalmar FF, Nanne Bergstrand, hevði eftir dystin bert rósur at bera spælarunum hjá EB/Streymi:

– Hetta var ikki ein dystur, ið minti um dystirnar í Allsvenskan, men tað høvdu vit heldur ikki væntað. Spælararnir hjá EB/Streymi stríddust væl og spældu við hjartanum. Fyri okkum hevði tað nógv at siga, at vit fingu hatta málið, men enn eru vit bara komnir hálvan veg, tí ein dystur er eftir enn.

hilmarjan@sosialurin.fo

## Argjamenn á varmakeldu

Ein dystur verður í Vodafonedeildini í vikuskiftinum. Í Fuglafirði tekur ÍF, sum hevur havt eitt gott kappingarár higartil, ímóti AB, sum liggur niðast í Vodafonedeildini. ÍF liggur á einum triðja plássi við 24 stigum og hevur eisini spælt seg í finaluna í kappingini um Løgmanssteypið. Argjamenn liggja niðast við níggju stigum og hava ikki megnað at hildið fram við góðu gongdini frá í fjør. Men liðini koma frá hvør sínari støðu frá seinasta vikuskifti. ÍF fekk bank í Fuglafirði av B36, meðan AB sum tað fyrsta í tíggju royndum megnaði at taka stig frá NSÍ.

Dysturin er leygardagin kl. 17.00.

trondur@sosialurin.fo

## Svenskur leikari til ÍF

ÍF fær í næstum ein svenskan leikara til royndarvenjing. Talan er um 19-ára gamla Magnus Berglund, sum sjálvur hevur spurt seg fyri hjá ÍF. Hann hevur seinastu tíðina spælt við Saxemara, sum spælir í triðju deild í Svøríki. Magnus Berglund sigur í samrøðu við svenskt blað, at hann gleðir seg til at sleppa at spæla í Føroyum. Hann nevnir eisini Gunnar Nielsen sum dømi um, at føroyingar kunnu framleiða stórtalent.

trondur@sosialurin.fo